# Byggimessa fyri alla familjuna

**Fyrsta føroyska byggimessan verður í Ítróttarhøllini á Nabb frá hósdegnum til leygardagin. Og talan er um eina umfatandi messu við nógvum ymiskum framsýnarum, fyrilestrahaldarum umframt undirhald, mat og drekka til alla familjuna**

Tað er nýggja fyritøkan, Kern, sum skipar fyri messuni. Fyritøkan tekur sær í høvuðsheitum av marknaðarføring og bókhaldi fyri smærri fyritøkur, umframt at hon ætlar at fyriskipa ymisk tiltøk.

Tað eru teir fýra, Jóan Pauli Lamhauge, stjóri, Arni Wintereig, Sigríður á Plógv og Magni Brøðraberg, sum eiga og reka fyritøkuna.

- Vit hava eitt sindur við byggivinnuna at gera, og hildu at tørvur var á einari messu, sum kundi savna vinnuna, bæði fyri at skapa sambond innanhýsis í vinnuni, men sjálvandi eisini fyri at kundin, sum ynskir at byggja hús, kundi hava møguleika at fáa allar veitarar á einum stað, greiðir Magni Brøðraberg frá.

Á messuni verður møguleiki at fáa kunning og tilboð innan alt frá fígging, trygging til byggisnið og byggitilfar.

### Skapa samstarv

Magni Brøðraberg sigur, at teir hava arbeitt út frá hugsjónini, at kapping er góð, men samstarv kann røkka enn longri.

- Vit halda, at tað hevur manglað eitt føroyskt forum, har vinnan kann møtast, síggja nýggj produktir og skapa nýggj netverk.

Á pállinum verða ymiskar framløgur, har fyritøkur millum annað kunnu sýna síni produktir og tænastur fram.

- Fleiri fyritøkur hava fingið útlendskar undirleverandørar at koma hendan vegin at halda fyrilestrar, og onkur útlendsk fyritøka hevur eisini bás á messuni, sigur Magni Brøðraberg og nevnir íslendska fyritøku, sum bjóðar útlendska arbeiðsmegi til byggivinnuna.

### Eisini til góma og børn

Hóast høvðusinnihaldið á messuni er bygging og alt sum hevur við bygging at gera, so hava fyrireikarnar lagt messuna soleiðis til rættis, at hon er til alla familjuna.

- Við norðara endan á høllini hava vit eitt stórt útispæliplláss, sum er innhegnað og har vaktir ansa børnunum. Her kunnu øll børn undir 15 spæla og hugna sær, meðan foreldrini kanna tilboðini inni í høllini, sigur Magni Brøðraberg.

Inni verður tónleikur á pallinum við Finni Jensen frá Páll Finnur Páll, og skipað verður eisini fyri kappingum, sum hava eitt hvørt við byggivinnuna at gera, so sum at smíðja og bora um kapp.

- Og so hava vit eisini matstovu, sum Café Natúr stendur fyri. Matstovan hevur skeinkiloyvi og bjóðar fyrstafloks mat, staðfestir fyrireikarin.

Messan verður opin frá hósdegi til leygardag, og fyrireikarnir vænta, at á leið 1000 til 1500 vitjandi verða um dagin.




*Magni Brøðraberg er ein av fýra eigurunum í fyritøkuni, Kern, sum skipar fyri stóru byggimessuni í Havn hetta vikuskifti. - Tørvur er á einari messu, sum kann savna byggivinnuna og geva kundunum høvi at fáa øll tilboðini á einum stað, staðfestir Magni Brøðraberg*

*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

---



*Fólk á Reykjavíkarleiðini aftra seg við at keypa fasta ogn (Mynd: Vísir)*

## Fáar húsasølur

**Í síðstu vórðu 45 handlar við fastari ogn skrásettir hjá myndugleikunum í Reykjavík og har um vegir, og so fáir hava handlarnir ikki verið tey seinastu 12 árini, skrivar blaðið Vísir. Sambært blaðnum vóru handlarnir 74 í meðal um vikuna í februar, mars og apríl. Sethúsasølurnar í høvuðsstaðarøkinum eru eisini fækkaðar munandi í seinastuni, og kemst hetta ivaleyst av teimum stóru rembingunum í íslendska fíggjarheiminum seinastu tíðina.**

## Tekna heimsins longstu brúgv

Danska Cowi hevur fingið til uppgávu at tekna og sniðgeva eina brúgv, sum skal gerast millum Qatar og oyggjarlandið Bahrain í Miðeystri. Brúgvin verður ætlandi 40 kilometrar long og heimsins longsta. Cowi hevur havt ymsar uppgávur fyri stjórnina í Qatar tey seinnu árini, men hendan er tann størsta. Í løtuni leitar felagið eftir egnaðum medarbeiðarum til uppgávuna. Eitt altjóða samtak skal gera sjálva brúnna, sum verður liðug í 2013.



*Bahrain er eitt av oljulondunum við Persaflógvan (Mynd: Polfoto)*